UMHVØRVISVIKAN
10.-16. MAI 2010

Stuðul

Tórshavnar kommuna veitir stuðul á hvørjum ári til heilsu- og umhvørvistiltøk.

Stuðul verður latin til verkætlanir sum:
- Menna vitanina um heilsu og/ella umhvørvi
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- Virka orku - og tilfeingissparandi
- Kunna almenningin um heilsu- og/ella umhvørvisviðurskifti
- Verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

Til ber hjá stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum at søkja um stuðul.

Umsóknarblað og reglugerð fáast á www.torshavn.fo ella í Snarskivuni.

Umsóknir skulu verða hjá Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 1. apríl 2010 og skulu sendast til:

Tórshavnar kommunu
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32 • 110 Tórshavn

Stuðulin verður latin í umhvørvisvikuni, sum verður 10. til 16. mai 2010.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Klubbin sum í 70'unum

Leygarkvøldið verður eitt sokallað 70´ara kvøld í Havnar Klubba. Tað er tónleikabólkurin Deiggj sum fer spæla góðan progressivan rocktónleik frá hálvfjerdsunum. Limirnir í Deiggj hava altíð havt ein serligan tokka til tann klassiska rockin sum serstakliga gjørdi seg galdandi í 70'unum. Eitt nú varð lurtað eftir Deep Purple, Uriah Heep, Fleedwood Mac, Gasolin, Jetro Tull og øðrum bólkum sum myndaðu tann meira progressiva tónleikin í hálvfjersunum. Eisini verður okkurt lag hjá føroysku Kræklingum, Dire Straits, Rolling Stones Creedens og John Lennon spælt leygarkvøldið. Deiggjarnir hava seinastu árini lagt seg eftir, at spæla tónleikin frá hesum tíðarskeiðnum. Í Havnar Klubba talan um blandað programm við vælsvingandi rútmum, bæði rockur og róligar balladur. Manningin í Deiggj er Dennis Lave, ið syngur flestu løgini, Páll Lave á gittari og kór, Pætur Dam á hammond og klaver, Fróði Vestergaard guitar og sang, Sverri Heinesen á bassi og nýggjasti limurin í Deiggj er Rani H. Christiansen sum spælur trummur.

Fyrilestur og kjak í Miðlahúsinum um búskaparpolitiska frágreiðing

# Á veg móti einum sjálvberandi búskapi

**– Frágreiðing um búskaparpolitiskar forðingar og møguleikar**

TÍÐINDASKRIV
*Norðuratlantsbólkurin*

Jóannes Jacobsen, Ph.d. í búskaparfrøði leggur fram búskaparpolitiska frágreiðing um búskaparlig og politisk viðurskifti ið hava størstan týdning fyri einum møguligum føroyskum sjálvberandi búskapi.

**Í Miðlahúsinum í Vágsbotni mánakvøldið 1. mars kl. 19.00**
Eitt av kunngjørdu málunum hjá Norðuratlantsbólkinum hevur frá byrjan verið at gjørt eina størri óhefta kanning av politisku búskaparligu og vinnuligu viðurskiftunum í Føroyum og Grønlandi og sambandinum við Danmark – herundir leiklutin hjá ríkisveitingini í hesum skipanum og møguleikarnir fyri sjálvberandi búskapi.

Norðuratlantsbólkurin er tískil sera fegin um, at tað hevur eydnast at fáa ein granskara í búskaparfrøði og ein samfelagsfrøðing at gera eina slíka kanning viðvíkjandi Føroyum, sum nú verður løgd fram.

Frágreiðingin viðgerð millum annað hesar spurningar:

- Hvussu er samanhangurin millum politikk, vinnu, ríkisveiting og búskap?
- Forðar ríkisveitingin fyri størri útflutningsvinnu?
- Ber fiskivinnan øllum føroyska samfelagsbúskapinum?
- Kann fiskivinnan kasta meira av sær – og hvørjar eru tær politisku forðingarnar?
- Hvat hendir, tá vit skera ríkisveitingina – og hvat hendir, um vit ikki gera tað?

Í frágreiðingini verður fyrst hugt eftir yvirskipaðu gongdina í føroyska búskapinum við atliti til m.a. inntøkustøði, vinnubólkabýti, lønargongd, miðsavning, vinnustudning og ríkisveiting.

Hareftir viðgerð frágreiðingin nakrar vinnupolitiskar forðingar og møguleikar í høvuðsvinnuni umframt ávirkanina av ríkisveitingini á føroyska búskapin.

Ávirkanin av ríkisveitingini verður viðgjørd bæði við atliti til hennara reint búskaparligu ávirkan og hennara ávirkan á búskaparpolitikkin.

At enda verður hugt út í framtíðina. Frágreiðingin viðger avleiðingarnar av eini møguligari niðurlaging av ríkisveitingini. Mett verður eisini um, hvussu ein sjálvberandi búskapur kann væntast at síggja út.

Á kjakfundi í Miðlahúsinum fer Jóannes Jacobsen at leggja fram sínar greiningar og niðurstøður og at svara spurningum.

# Ung í Føroyum 2010 verður um vikuskiftið

UNGDÓMUR

Um vikuskiftið verður Norðurlandahúsið endavent. Húsið fer at surra av virksemi, áræði og ikki minst skapanarhuga. Hetta vikuskiftið er tað, at ársins »Ung í Føroyum-stevna« fer av bakkastokki.

Ung í Føroyum er ein heilt serlig mentanarhending, har ung í aldrinum 13 til 18 ár sleppa at geva sítt boð uppá, hvat ungdómsmentan er. Í ár eru seks verksmiðjur við tónleiki, dansi, sirkusi, myndlist, design og skriving. Verksmiðjuleiðararnir skulu vera vegleiðarar meira enn leiðarar, teir hava ikki fasta skrá lagda fyri verksmiðjuna, men skulu í samstarvi við tey ungu seta leggja vikuskiftið til rættis, so øll fáa sum mest burturúr á tí støði, tey eru komin til.

Og tað eru veruliga dugnalig listafólk, sum verða vegleiðarar: Á tónleikaverksmiðjuni verða Lena og Niclas, sum øll ung kenna og nógv elska, Vígdis Hentze kemur heim úr New York at vegleiða dansararnar, yrkarin og rokktónleikarin Petur Pólson stendur á odda fyri skriviverksmiðjuni, sniðgevin Katrina í Geil hevur designverksmiðju, listamaðurin Janus á Húsagarði skal læra frá sær á myndlistaverksmiðuni og franski klovnurin og línudansarin Joel Colas kemur beint úr Fraklandi at hava sirkusverksmiðjuna undir hond.

Meðan arbeitt verður, eru verksmiðjurnar stongdar fyri vitjandi, bert ein hevur óavmarkaða atgongd, og tað er orkesturleiðarin Bernharður Wilkinson, sum skal orkestrera stóru almennu sýningina, sum verður sunnudagin 28. februar klokkan 18 við brotum av øllum tí, sum er hent á stevnuni.